# upplivingum

Marcus Bourget, frá, at Føroyar hava nýligani samtykt, at anti-diskriminatións lógin eisini skal fevna um samkynd.

– Tað eru hesi fólk (Reðin Húsdal Leonsson og vinfólk hansara, blðm.) komin fyri at hátíðarhalda saman við okkum – fyri mær er tað hetta, sum Mardi Gras snýr seg um, segði Marcus Bourget.

Reðin greiðir annars frá, at Sydney Mardi Gras er ein av teimum heilt fáu skrúðgongunum, har ein rúgva av stovnum luttaka, og nevnir hann løgregluna, sjúkrabilar og borgarstjóran í Sydney sum dømi um nøkur av teimum almennu sum luttóku.

## Tónleikur, sjónleikur og dansur

Sydney Mardi Gras byrjaði leygarkvøldið klokkan 20.30 og endaði um 23-tíðina.

– Skrúðgongan sjálv er mitt í býnum og fevnir um einar tveir kilometrar vild eg mett. Tónleikur og sjónleikur er ein stórur partur av skrúðgonguni, og nærum allar "entry'irnar" høvdu tónleik og "dansirutinur", fortelur Reðin, sum tekur soleiðis saman um stóra tiltakið.

– Tað var heilt ótrúliga gott, og vit fingu sera góð aftursvar. Persónliga vil eg siga, at hetta er ein av mínum størstu upplivingum.




*Frá vinstru hava vit Steve Withers Norris, Gavin John Lewis, Reðin Húsdal Leonsson og Jules Major*

## Gjørdi nógv interview

At Reðin og vinfólk hansara vaktu ans við bannara teirra og slagorðinum "Faroe Islands moving forward" sæst eisini á alskyns heimasíðum og tíðarritum.

– Vit vórðu interviewaði í trimum útvarpsstøðum, sjónvarpið og til ymsar heimasíður, sigur Reðin. Á alnetinum fæst eisini sjón fyri søgn, har Reðin Húsdal Leonsson er endurgivin hjá millum annað Reuters og Daily Times.




*Steve Withers Norris og Reðin Húsdal Leonsson (høgrumegin) ganga við bannaranum við áskriftini "Faroe Islands moving forward"*

Sydney Mardi Gras:

# Føroyar umboðaðar á heimsins størstu homo-skrúðgongu

**Heimsins største skrúðgonga fyri samkynd var í Sydney um vikuskiftið. 7500 fólk gingu marsjeraðu, 400.000 áskoðarar hugdu at í gøtunum í Sydney, umframt at skrúðgongan varð varpað út til fleiri milliónir hyggjarar, sum millum annað kundu síggja Føroyar verða umboðaðar undir slagorðinum "Faroe Islands moving forward"**

**MENTAN**
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Tað er leygardagur. Klokkan er hálvgum níggju um kvøldið. Í miðbýnum í Sydney pumpar tónleikurin og 7500 litrík og lívlig fólk koma syngjandi og dansandi gjøgnum gøturnar.

Sydney Mardi Gras er júst farið av bakkastokki. Hetta er 29. ferðin at skipað verður fyri hesi skrúðgongu, sum er ein sterk politisk skrúðgonga, har ljós verður varpað á viðurskiftini hjá samkyndum.

## Sterkur politiskur boðskapur

Reðin Húsdal Leonsson, sum lúttók á skrúðgonguni leygardagin, lýsir týdningin av henni soleiðis.

– Skrúðgongan hevur alstóran týdning fyri samkynd um allan heimin. Hon vísir á at rættindi hjá samkyndum hava týdning, og at samkynd hava rætt til somu rættindi sum øll onnur. Skrúðgongan hevur ein sterkan politiskan boðskap, greiðir Reðin Húsdal Leonsson frá og vísir síðani á, at skrúðgongan er ein av teimum fáu møguleikunum hjá samkyndum at savnast og fagna fjølbroytni, felags samleika og rætt til at elska frítt.

## Lítil mótmælisgonga grundarsteinurin

Tað var annars í 1978, at Sydney Mardi Gras sá dagsins ljós. Tá var talan um eina lítla mótmælisgongu, har ljós varð varpað á støðuna hjá samkyndum í Avstralia, sum vóru fyri mismuni og vanbýti.

Hetta er grundarsteinurin undir tí stórfingna tiltaki, sum 400.000 áskoðarar og milliónir av sjónvarpshyggjarum vóru vitni til farna leygarkvøld. Eitt tiltak har Føroyar vóru umboðaðar og fagnast varð um, at grein 266b í revsilógini nú eisini fevnir um samkynd.



*7500 fólk luttóku í Sydney Mardi Gras og í gøtunum fylgdu fleiri enn 400.000 fólk skrúðgonguni*